## DAGSINS MEINING

# Okkara ábyrgd

Tsunami ella flóðaldan, ið eftir fáum minuttum týndi fólk og fæ í túsindatali í Suðurasia, er ein ræðulig áminning um, hvussu smá og veik vit menniskju eru, tá náttúran vísir seg í allari sínari ræðuligu megi. Slíkar náttúrvanlukkur kunnu ikki fyribyrgjast, men ávaringarskipaninar kundu ivaleyst verið nógv betri. Her er tørvur á betri samskipan av altjóða samstarvinum á hesum øki.

Undir slíkum umstøðum skulu altjóða samfelagið og altjóða samhaldsfestið standa sína roynd. Fyrstu samdøgrini hava víst, at hetta er eingin trupulleiki. Hóast ómetaliga stórar trupulleikar av frástøðu og flutningi, so streymar hjálpin til vanlukkuraktu økini í Suðurasia. Tað er ómetaliga trupult at røkka øllum, sum hava tørv á hjálp. Fólk býr á fjarskotnum plássum og í fjarløgdum oyggjasamfeløgum, har telesamskiftið, ið frammanundan vanlukkini var vánaligt, nú er burtur.

Tað er heimssamfelagsins ábyrgd at hjálpa, tá slíkar vanlukkur raka og hetta er uttan mun til, um slíkt hendir um okkara leiðir ella hinumegin jarðarknøttin. Norðurlond ganga sum vant á odda og hava longu avskipað tjøld, teppi, mat, heiluvág og fersktvatnsgeneratorar í stórum mongdum. Starvslið við læknum og sjúkrarøktarserfrøðingum eru send avstað, har tørvur er mettur at vera mestur. Noreg er sum vanligt á odda í hesum tiltaki, men hini norðurlondini eru væl við. Víst er slík stór vanlukka heimssamfelagsins ábyrgd men er eisini talan um okkara ábyrgd. Føroyingar eru altíð til reiðar at hjálpa tá stórar náttúruvanlukkur raka í útheiminum – tað verið seg nær ella fjar. Fólk taka vanliga rívan til, tá soleiðis er og tað stendur sum kunnugt ongantíð á hjá privatfólki, kirkjum, samkomum og felagsskapum at hjálpa. Óneyðugt er at nevna dømi um hetta. Hinvegn er tað eitt sindur øðrvísi við tí almenna. Vit hava ongan politikk fyri humaniterum arbeiði á altjóða støði.

Vit hava mangan á hesum staði mælt til, at tær almennu Føroyar skuldu tikið størri altjóða ábyrgd ikki bert, tá vanlukkur sum kríggj, hungursneyð og náttúrukatastrofur raka menningarlond, men sum heild at vera meira við í altjóða humanitera arbeiðinum. Í gjár mæltu vit til at fara undir at skifta orð um innihaldið í einum føroyskum menningarhjálparpolitikki, eins og vit mæltu til, at føroyskar samkomur, kirkjur, stovnar og felagsskapir, ið altíð hava verið tilreiðar at hjálpa, verða tikin við uppá ráð, tá hesin politikkur skal orðast. Vit fegnaðust eisini um, at løgmaður og landsstýrið reageraðu so skjótt og boðaðu frá, at landsstýrið fór at mæla løgtingsins fíggjarnevnd til at játta eina millión krónur til neyðhjálpararbeiðið, sum er í gongd. Nú bíða vit eftir, at fíggjarnevndin fer at ganga ynski løgmans á møti. Peningurin verður latin altjóða Reyðakrossi og har er hann í góðum hondum. Tað tænir løgtingi, landsstýri og øllum Føroya fólki til æru, um henda upphædd skjótast møguligt verður játtað til altjóða hjálparарbeiðið. Ein millión er ikki nógvur peningur, men í tí neyðstøðu, sum ræður er tað so, at allur bati bøtir. Kanska áttu nakað meira at verið játtað. Vit eru hóast alt eitt av heimsins ríkastu londum. Reyðikrossur í Føroyum fer nú at skipa fyri innsavning, soleiðis, at uppaftur meira peningur kom úr Føroyum. Hetta er sera gott, og vit loyva okkum til at mæla fólki,vinnulívi, kirkjum, samkomum, felagsskapum og myndugleikum til at taka væl ímóti hesum stigi hjá Reyðakrossi í Føroyum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Hjálpi Sri Lanka

**Stella Zachariassen**
*Argir*

Sorgarleikir koma al oftast yvir okkum tá vit minst vænta tað, og tað sum er hent í Asia og serliga Sri Lanka, sum er mítt móðurland, er ein stórur sorgarleikur. Íbúgvar á Sri Lanka hava verið ígjøgnum so nógv ringt síðani kríggi byrjaðið í 1983 og sorgarleikirnir fáa næstan ongan enda. Tá eg sat og hugdi eftir myndunum sum komu um sjónvarpsskíggjan og sá at har vóru fólk sum smíltust, tá hugsaði eg at hesi fólk hava verið ígjøgnum so nógv, og tó altíð til reiðar at smílast. Tað er eitt stórt sjokk at verða á hesari síðuni av jørðini feiðrandi jól og njóta alt tað góða, meðan fólk á hinari síðuni av jørðini standa vónleys og við eini daprari framtíð.

Eg skrivi hetta bræv fyri at heita á tykkum føroyingar og Føroyar sum eitt fólk at minnast Sri Lanka og fólkið har og biða eina bøn fyri teimum. Gud var villigur at bjarga Sodoma og Gomorra um bert ein rættvísur persónur var har, og sjálvt um Sri Lanka er eitt land við ymiskum religiónum og mentanum, so eru vit øll menniskju við sama skapi og øll hava følilsi.

Eg havi tosað við foreldur míni á Sri Lanka og tey søgdu frá at gøturnar í býnum eru fyltar við menniskjum sum syrgja og sum eru farin frá húsi og heimi bert við einum posa í hondini og í posanum er alt tey eiga, restin er burtur. Eisini søgdu tey frá sorg har fólk hava mist børn, mann, konu, mammu, pápa og familju og sorgin er stór. Pápi mín segði frá at flóðin steðgaði bert einar 100 metrar frá teirra húsum.

Hetta er tíðin har vit sum menniskju mugu hava samkenslu og tørv á at deila okkara jólagleði. Tørvur er á bøn og fíggjarligum stuðli. Øll hava brúk fyri vón og øll vit í Føroyum kunnu verða tann vónin fyri Sri Lanka. Føroyar kunnu vera ein lítil tjóð, hjarta- og sinnalagið er sera stórt og gevandi, so tað sum er sera tídningarmikið er at vit sum ein tjóð reisa okkum og »lend a helping hand« (rætta út hjálpandi hond). So nógvir fiskimenn eru burturblivnir. Hesir, sum bert tjena uml. 10 kr. um dagin til at hjálpa familjuni eru burtur og heima situr so konan og børn við ongum. Konan, sum oftast uttan útbúgving, situr heima uttan vón at fáa arbeiðið og skal finna sær aðrar vegir at syrgja fyri familjuni. Lat okkum birta vón í hesum menniskjalívum við at hjálpa til.

Nú havi eg skrivað og biðið tykkum um hjálp á Sri Lanka, tí hetta er mítt móðurland. Eg sendi eisini hesar tankar til tey sum eru í hinum londunum rundanum og sum eru rakt av hesum hervuliga sorgarleiki.

Eg vil eisini takka Føroya landi fyri tann stuðul tit hava valt at senda til suður eystur Asia.

At enda vil eg biðja tykkum um at minnast mítt sera vakra heimland, sum hevur tilnøvn sum Paradise Island og Pearl in the Indian Ocean. Enn einaferð túsund takk fyri samkenslu og hjálp.

# Jólakonsert í Sørvági

**Vágakórið fer at hava jólakonsert í Sørvágs Kirkju hóskvøldið klokkan 20.00. Øll skráin, sum varð framførd á Giljanesi fyri jól, verður aftur at hoyra á konsertini í Sørvági**



**TÍÐINDASKRIV**
*Vágakórið*

Hóskvøldið 30. december klokkan 20.00 fer Vágakórið at hava jólakonsert í Sørvágs Kirkju. Framførd verður skráin, sum var at hoyra í auluni á Giljanesi sunnukvøldið fyri jól.

Kórið, sum var at síggja og hoyra í sjónvarpi um jólini við einum parti av hesi konsertini, fer at syngja nógvar av kendu jólasálmunum, eins og eisini onnur, fyri summi kanska minni kend verk, verða at hoyra.

Millum annað, sum verður framført, verður verkið »Einglaljóð«, sum Frits Johannesen hevur gjørt føroyskan tekst til, og har tann ungi pianisturin úr Miðvági, Oluf Dam, fer at hava fylgispæl.

Onkur Mariuvísa verður við. Eitt nú ein hjá kenda týska tónaskaldinum Johannes Brahms, sum nevnist »Der Jäger«, sum Aksel Tórgarð fyri árum síðan týddi til Vágakórið, og nevnir »Veiðimaðurin«.

Umframt teir kendu jólasálmaranar og -sangirnar, fer kórið eisini at syngja okkurt kent, gamalt danskt jólalag, sum føroyskur tekstur er gjørdur til.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.